VIÐMERKINGAR

## Hvat kosta suðuroyingar?

**Hans Birgir Hansen**
*Samfelagsrevsari í Havn*



Tað kundi verið áhugavert at fingið upplýst, hvat suðuroyingar kosta okkum norðanfjørðs, tá vit halda lív í øllum virkseminum í Suðuroynni og eiga lívið í øllum suðuroyingum í dag.

Tað eru ábyrgdarleysir kommunalpolitikarar og vinnulívsfólk, ið koyrdu alt á heysin og fingu gjørt Suðuroynna til eftirbát á flest øllum økjum, ið slett ikki klára at hóra undan kreppunum!

Eg haldi tað vera nógv fyri, at skuldarfríar kommunur norðanfjørðs skulu hjálpa teim skuldarraktu kommununum í Suðuroynni, ið mistu allan sín pening í dómúrskurði í Føroya Rætti!

Hvussu nógvir suðuroyingar ferðast hvønn morgun og kvøld millum Suðuroynna og Suðurstreymoy við atliti til arbeiði, skúla, handil, vinnulív, náttarlív og frítíðartiltøk í dag! Eg havi áður víst á suðuroyingar, ið eru fluttir norðanfjørðs tóku alt tað fíggjarliga grundarlagið undan øllum kommununum, ið eingi vil síggja í eyguni sum tann bera nakna veruleika í dag!

Eg haldi at kommunalpolitikarar og vinnulívsfólk skulu vera undir eftirlit av fólki fyri tann fíggjarliga og politiska heimin, skal sleppast undan fleiri kreppum, ið raka Suðuroynna! Fluttu allir suðuroyingar norðanfjørðs suður aftur til heimstaðarkommununa, fingu hesar fleiri skattaborgarar og skattainntøkur, hvat ið teim tørvar fyri at kunna svara fíggjarligar skyldur.

Eg havi áður nevnt møguleikan, at Norrøna kundi lagt at í Suðuroynni, bæði niðurgangandi og uppgangdi til og frá Hetlandi og Danmark, ið vil spara flutningsútreiðslur1 Drelnes er ikki egnað til nýggja samferðsluhavn. Tvøroyri skuldi ístaðin fyri fingið djúpvatnshavn og Vágur skuldi fingið samferðsluhavn sunnan fyri virkið hjá Føroya Fiskavirking í Vági!

Eg haldi at kommunurnar í Suðuroynni skuldu tikið seg burtur úr interkommunalum felagsskapum og fingið egna brennistøð ístaðin fyri IRF og elverk ístaðin fyri SEV-felagsskapin! Nýggi Smyril eigur ikki bert at sigla ímillum Suðuroynna og Suðurstreymoy, men til Klaksvíkar og Runavíkar, tí tá slepst undan øllum trailaraflutningi úr Eysturoynni og Norðoyggjum!

Vit kunnu væl klára okkum í Havnini og Suðurstreymoy uttan allar suðuroyingar, og eisini avbygdarfólk úr øðrum oyggjum, ið ein kann koma aftur til undir somu yvirskrift í lesarabrøvunum!

Tað kann ikki vera rættvíst, at kommunur uttan fyri Havnina/Suðurstreymoy skulu liggja inni á okkum og sleppa sær undan ábyrgdum og skyldum av íbúgvum í kommununum í allari Suðuroynni! Vit hava nógv arbeiðsleys/tøk og uppvaksandi ættarlið, ið avbygdarfólkið hevur skúgvað til síðis vegna tann rikna familju-, vina- og kenningapolitikk, ið gevur mær veruligu andstygdina í Havnini!

## Verjur kommunusamskipan Føroyar (KSF) allar sínar borgarar ella bert áhugamál hjá stýrinum?

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur á Tvøroyri*



Hesin felagsskapur, sum skal eitast at umboða tveir triðingar av øllum íbúgvum í Føroyum, hevur nú lati seg hála eftir hárinum av landinum, í fleiri ár.

**KSF stýringin**

KSF er stýrdur av seks borgarstjórum, sum hava valt seg sjálvan í stýri og teirra kommunuskrivarum. Ein skuldi trú, at eftir nøkrum árum vildi hesin felagsskapur haft eina ávísa ávirkan ella slagkraft, sum kom teimum borgarum til góðar, sum hava valt hesar borgarstjórar, men hetta er tíverri ikki so.

**KSF ávirkanin**

Hon er lítið og einki verd, okkurt skriv er sent til landsstýrið, sum í fleiri ár hevur minka um inntøkurnar og økt um útreiðslurnar hjá kommununum, uttan so mikið sum at spyrja kommunurnar um, hvat tær halda um hesi inntriv og fíggjarskerjingar.

Besta dømi um niðurgeringina frá landinum er, tá sjálvur løgmaður alment kemur fram og sigur, at kommunurnar einki skulu merkja til skerjingar, meðan veruleikin er beint øvugtur.Hetta vita teir seks borgarstjórarnir fullvæl.

Tá í leiðarin í einari samgongu trínur alment fram og sigur ósatt, hvørjum skalt tú so trúgva?- ja, tú kanst so ikki trúgva nøkrum av hansara monnum.

**KSF eigur at mótmæla nógv meira.**

At koma við einum lítlum "pippi" nú barnaverndarøki blívur slongt í høvdi á kommununum er alt ov neyðarsligt. Verði ikki so uppgevandi, lat landi eiga øki.

Hvørki KSF ella landi vita hvussu yvirtøkan skal gerast, hvørki umsitingarliga ella fíggjarliga og tí blívur hesin lesturin ein fíggjarlig katastrofa fyri borgarar í tykkara kommunum.

Stendur tað til landi, so skal sum mest leggjast á kommunurnar kosta hvat tað vil, hetta hevur jú verði parolan hjá landsstýrinum í øll árini.

**KSF politiskur?**

Onkur kundi fingið tann óhugnaliga tankan, at felagsskapurin ikki gjørdi so nógv um seg mótvegis landsstýrinum, tí politisku litirnir í felagsskapinum og í landsstýrinum eru identiskir, men vónandi er tað ikki so.

## Als ikki nøkur stór broyting

**Erhard Jacobsen**



Í bløðunum hevur nógv verið gjørt burturúr at limir í Starvsmannafelagnum nú skulu hava fingið styttri arbeiðstíð.

Í Sosialinum verður til dømis sagt soleiðis:

"Ein av stóru broytingunum í sáttmálanum er, at arbeiðstíðin minkar við trimum tímum um vikuna. Arbeiðsvikan verður ikki longur 42 tímar, men 39 tímar, og matarsteðgurin verður hálvan tíma um dagin."

Her tekur blaðmaðurin tíverri ov rívan til, tí talan er als ikki um nakra stóra broyting.

Rætt skal vera rætt: arbeiðstíðin er stytt. Ikki við 3 tímum, men við hálvum tíma um vikuna. Men afturfyri hava starvsfólk latið hálvantriðja tíma um vikuna fyri púrt onki, tí tey allarflestu starvsfólkini hava longu frammanundan havt hálvan tíma um dagin til matarsteðg á arbeiðsplássinum. Tað vil siga at frítíð er býtt um við frítíð, soleiðis at tað nú skal eita seg, at limir í Starvsmannafelagnum arbeiða einar hálvtannaðhundrað tímar færri um árið enn frammanundan.

Í veruleikanum er talan bara um einar 20 tímar færri um árið, ella ein 1% lækking í arbeiðsbyrðuni, ein lækking, sum helst verður flutt yvir í vanligu arbeiðstíðina.

Átti í hesum sambandi kanska at nevnt, at í okkara grannalondum er vanliga arbeiðsvikan 37 tímar, íroknað matarsteðg.

## Havnin og landbúnaðurin

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini royndi herfyri at seta eld í málið um Hoyvíksgarð, tá hann brádliga dróg tað inn á løgting í einum fyrispurningi til landsstýrið.

Hetta var eftir mínum tykki sera óhóskandi, tí stutt frammanundan hevði hann sjálvur í byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar Býráðs verið við til at gera avtalu við bóndan um, at bóndin og tekniska umsitingin skuldu tingast um málið.

Støðan í málinum er í stuttum, at fleiri áhugamál stoyta saman í Hoyvíkshaganum ella á Vatnaskørðum beint nú.

Kommunan arbeiðir við eini nýggjari heildarætlan fyri útbygging av Tórshavnar býi. Hendan ætlan fevnir um stórar ætlanir um fleiri sethúsagrundir í Hoyvíkshaga komandi 20-25 árini. Ætlanin fevnir eisini um beinanvegin at leggja pláss av til ein golfvøll á nakað somu leið.

Frammanundan er Hoyvíksgarður har uppi. Bóndin metir, at hann hevur brúk fyri meira lendi, enn honum er ætlað, skal hann fáa nóg góðan rakstur. Tí vil hann tryggja sær partar av sama lendi, sum onnur hugsa sær til sethús og golfvøll.

Har stendur málið í dag.

Tað seinasta, vit í byggi- og býarskipanarnevndini vita um málið, er, at bóndin á Vatnaskørðum og tekniska umsitingin eftir samtykt í nevndini skula tingast um møguleikarnar fyri at byggja garðin út, og hvussu hesar ætlanir kunnu samansjóðast við nýggju heildarætlanina, sum er í stoypiskeiðini.

Tað harmar meg at síggja, at bæði býráðsformaðurin og næstformaður hansara fara so harðliga fram ímóti málinum, meðan tað er til viðgerðar millum bóndan og teirra, sum kommununnar vegna arbeiða við heildarætlanini.

Fái tað ikki til annað enn, at leiðslan í býráðnum ynskir bóndagarðin hagar piparið grør, so sum mest av Hoyvíkshaganum kann leggjast undir asfalt og betong.

Hetta hevur ikki verið støðan í byggi- og býarskipanarnevndini. Har havi eg hildið meginpartin av limunum taka undir við, at so nógv fyrilit, sum til ber, verður víst landbúnaðinum í kommununi.

Tessvegna hava vit sett partarnar saman at vita, hvat teir kunna koma ásamt um.

Tí tað forpliktar, um vit vilja tað ella ei, at Tórshavnar Kommuna í dag eisini er landsins størsta landbúnaðarkommuna.



# Eg havi fingið uppreisn

ALMENN UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg eri ómetaliga fegin. Tað, sum hevur størstan týdning fyri meg, er, at eg eri fullkomiliga reinsaður og havi fingið uppreisn.

Hetta sigur Jákup Mørkøre í sínum fyrstu viðmerkingum aftaná at Føroya Rættur fyrr í vikuni feldi dóm í málinum, sum hann reisti ímóti Almanna- og heilsumálstýrinum.

Í januar í 2000 varð hann koyrdur frá sum leiðari fyri Landssjúkrahúsið. Hann varð sannførdur um, at grundarlag var ikki fyri at koyra hann frá og tí stevndi hann.

Og nú hevur Føroya Rættur fríkent hann 100 %.

### Krevur treiskni og dyggan stuðul

Men at tað kann vera bæði drúgvt og møtimikið at koma upp á tvørs av almennu Føroyum, má Jákup Mørkøre ásanna, tí tað tók honum næstan fýra ár at vinna sín rætt.

Og nú dómurin er fallin, er hann bara fegin, men hann hevur ikki so stóran hug til tær nógvu viðmerkingarnar.

Men hann viðgongur, at tað krevur bæði treiskni og dyggan stuðul frá húskinum at gjøgnumføra eina sak sum hesa.

Og hann viðgongur eisini, at tað er ikki serliga hugaligt at liggja undir øllum møguligum ákærum í fleiri ár og at tað skal taka so langa tíð.

– Dómsvaldið í Føroyum melur, umenn tað melur ómetaliga seint og tað er tyngjandi, leggur hann afturat.

– Tað, sum hevur týdning fyri meg, er, at eg havi fingið uppreisn.

Hann fegnast eisini um, at nú er málið lýst út í æsir.

Hann vónar eisini, at vit taka við læru av hesum málinum í sambandi við viðurskiftini ímillum almennar myndugleikar og starvsfólk.

### Rætturin vísir øllum aftur

Helena Dam á Neystabø varð landsstýriskvinna í heilsumálum um hetta mundi og hon segði, at orsøkin til, at Jákup Mørkøre varð sagdur upp, var at hann var bæði

ólýðin og óloyalur ímóti politiska myndugleikanum. Ein onnur orsøk var, at hann var óegnaður at vera leiðari fyri Landssjúkrahúsið. Ein onnur uppsagnargrund var, at Jákup Mørkøre hevði ikki evnini at samskifta við tey, hann skuldi samskifta við, eitt nú álitisfólk, fakfeløg o.s.fr. og



*– Tað, sum hevur størstan týdningin fyri meg, er, at eg eri reinsaður og havi fingið fulla uppreisn, sigur Jákup Mørkøre. Føroya Rættur sigur, at tað vóru ongar sakligar orsøkir til at koyra hann frá sum leiðari fyri Landssjúkrahúsið*

tí skapti hann ótryggleika.

Men hesum vísir Føroya Rættur aftur.

Jákup Mørkøre var hvørki ólýðin ella óloyalur. Hann var heldur ikki óegnaður at verða leiðari og manglandi evnini at samskifta eru ikki prógvað, sigur Føroya Rættur.

Rætturin sigur, at, at hetta eru so álvarsligar ákærur, at tað er neyðugt at prógva tær.

Men hetta hevur Almanna- og heilsumálastýrið ikki megnað.

Ein orsøk til at Helena Dam á Neystabø helt at Jákup Mørkøre var ólýðin og óloyalur, var, at hann hevði fortalt í sjónvarpi Føroya, at tað var neyðugt at siga nógvum fólkum upp á Landssjúkrahúsinum, uttan at hon visti nakað sum helst um tað. Seinni hevði hon fingið at vita, at talan kanska fór at verða um 8-10 uppsagnir.

Men rætturin heldur, at tað kann ikki vera orsøkin til uppsøgnina.

Høgni Joensen, sum varð aðalstjóri, vitnaði eisini í rættinum um, at hann framman undan hevði fingið at vita frá Jákup Mørkøre, at neyðugt var at siga nógvum fólkum upp og at hann hevði ikki mótmælt.

Hann segði somuleiðis, at hann ongantíð hevði hoyrt, at nakað hevði verið galið við tí arbeiðið, sum Jákup Mørkøre hevði gjørt í sambandi við fíggjar-lógina.

Hetta hevði Helena Dam á Neystabø eisini fingið at vita. Høgni Joensen mintist ikki um talið 27 uppsagnir vórðu nevndar fyri Landsstýriskvinnuni, men hann var vísur í, at 24 uppsagnir vórðu nevndar fyri henni. Hvar hon hevði talið 10 uppsagnir frá, visti hann ikki.

Rætturin sigur eisini, at Jákup Mørkøre hevði av røttum fingið tað fatan, at tað var eftir avtalu við Almanna- og Heilsu-málaráðið, at uppsagnirnar vórðu settar í verk.

Rætturin sigur, at tá ið fólk skulu sigast upp, slepst ikki undan at skapa ótryggleika. Men Almanna- og heilsumálastýrið hevur ikki prógvað, at Jákup Mørkøre ikki dugir at samskifta við onnur. Tað einasta, sum fyriliggur í málinum um hetta, er, at Helena Dam á Neystabø biðjur hann um at halda sáttmálarnar í sambandi við uppsagnir.

### Uppsøgnin ógyldug

Rætturin kemur tískil til tað niðurstøðu at ongar sakligar orsøkir vóru fyri at siga Jákup Mørkøre úr starvi og tí er uppsøgnin ógyldug.

Tí verður Almanna- og Heilsumálastýrið dømt at viðurkenna, at uppsøgnin er ógyldug. Almanna- og Heilsumálastýrið skal eisini viðurkenna, at Jákup Mørkøre ar ikki ólýðin og óloyalur og at tað er skeivt, tá ið sagt verður í uppsøgnini, at hann hevur megnað at stjórna Landssjúkrahúsinum á nøktandi hátt.

Tí er Almanna- og Heilsumálastýrið dømt at gjalda Jákupi Mørkøre 60.000 krónur í endurgjaldið. harafturat skal stýrið rinda 40.000 krónur í sakarmálskostnaði.

# Jákup varð offraður tí tað var tað lættasta

**Helena Dam á Neystabø vildi ikki at koma upp á tvørs á løgmanni. Men okurt høvd skuldi rulla og valið fall á Jákup Mørkøre, leiðara fyri Landssjúkrahúsið, tí hann var ikki tænastumaður og sostatt var hann lættast at sleppa av við**

ALMENN UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Var tað mestsum av berari tilvild at Jákup Mørkøre varð sagdur úr starvi sum leiðari fyri Landssjúkrahúsið í januar í 2000.

Tað er ein spurningur, sum kann reisast, eftir at hava lisið vitnisfrágreiðingina, sum Høgni Joensen, sum tá var aðalstjóri í Almanna- og Heilsumálaráðnum gav Føroya Rætti, tá ið uppsøgnin varð viðgjørd. Sí grein aðrastaðni her á síðuni.

Í øllum førum sigur gamli aðalstjórin, at Jákup Mørkøre varð uppsagdur tí hann var tann, sum tað var lættast at sleppa av við.

Í øllum rokinum sum var um sparingar á Landssjúkrahúsinum, endaði tað við, at sjálvur Løgmaður kom upp í málið og skrivaði Helenu Dam á Neystabø eitt rættiliga hvassorðað skriv.

*Tá ið tað var greitt, at okkurt høvd skuldi rulla, savnaðu tey alt tað negativa saman, sum tey vistu um Jákup Mørkøre, tí tað var lættast at sleppa av við hann, sigur Høgni Joensen, sum var aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum, í vitnisfrágreiðing síni í Føroya Rætti*

Harsigur Løgmaður, at hann góðtekur ikki, at hópuppsagnir verða fráboðaðar á Landssjúkrahúsinum, uttan at hann er kunnaður um tað frammanundan.

Er orsøkin til hetta vánaliga arbeiðslagið tann, at embætisførslan í fyrisitingini í Almanna- og Heilsumálaráðnum ikkier nøktandi, eigur tað at fáa avleiðingar. Fæst greiða á hesum ikki alt fyri eitt, fer Løgmaður sjálvur at taka neyðug stig í hesum málið, er greiði boðskapurin frá Anfinni Kallsberg til Helenu Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø hevu greitt rættinum frá, at hon tók avgerð um at siga Jákup Mørkøre upp, áðrenn hon fekk brævið frá Løgmanni og at uppsøgnin tí onki hevði við boðini frá Løgmanni at gera.

Men hetta samsvarar ikki við tað, sum Høgni Joensen, sum var aðalstjóri, hevur vitnað fyri rættinum.

Hann sigur, at brævið frá løgmanni kom ein fríggjadag fyrrapart og Helena Dam á Neystabø boðaði seinnapartin frá, at Jàkup Mørkøre skuldi sigast upp.



Helena Dam á Neystabø hevði spurt Høgna Joensen, hvussu hann skilti brævið. Sjálv skilti hon tað soleiðis, at antin skuldi hon frá, ella skuldi Høgni Joensen sigast upp, ella Jákup Mørkøre,

Høgni Joensen svaraði, at tað bleiv hennara val og at hann føldi seg ikki meiri hóttan enn vanligt.

Eftir tað hevði Aibritt á Plógv fortalt fyri Høgna Joensen, at Helena Dam hevði eisini ráðført seg við hana um brævið. Helena Dam á Neystabø hevði spurt Aibritt á Plógv um hon skuldi velja Høgna Joensen ella Jákup Mørkøre. Aibritt á Plógv hevði svarað, at tað var lættari at taka Jákup Mørkøre.

Høgni Joensen sigur, at Helena Dam á Neystabø vildi ikki koma uppá tvørs av Løgmanni og tað skiltist at tí skuldi okkurt høvd rulla.

Viðmerkjast skal, at tá ið sagt verður, at tað er lættast at sleppa av ið Jákup Mørkøre, skal tað helst skiljast so, at hann er ikki tæn-astumaður og hevur tí stutta uppsagnarfreist. Høgni Joensen er tænastumaður og tað er tí ein nógv longri mannagongd at siga hann upp. Og at Helena Dam á Neystabø skuldi siga seg sjálva frá er kanska ilt at hugsa sær.

Høgni Joensen sigur, at tá ið avgerðin varð tikin um at siga Jákup Mørkøre upp, savnaðu tey alt tað negativa saman, sum tey vistu um hann fyri at brúka tað sum grundgeing fyri uppsøgnini.

Thomas Magnussen á fíggjarmálastýrinum, hjálpti teimum at skriva uppsøgnina og Høgni Joensen heldur, at tað var Thomas Magnussen, sum hevði avgerandi orðið at siga um, hvat skuldi standa í hoyringsskrivinum, sum varð send Jákupi Mørkøre uppundir sjálva uppsøgnina.